skil fekk eg onga minstuløn fyri vártíðina, tí inntøkan varð løgd saman fyri árið.

Vit vóru tveir bestimenn. Hin var Mikkjal, pápi Ivan Johannesen, fyrrverandi løgtings- og landsstýrismann. Eg skal rósa teimum á skipasmiðjuni. Teir vóru sera hampiligir. "Álaker" var eitt toppskip í Føroyum, sum øll tosaðu um. Kann nevna sum dømi tvey ár, tá vit vóru burtur í júst um tveir mánaðir, og veiðan var 563 skippund. Til sammetingar kann nevnast, at fyrsta túrin Óla Jacobsen í 1958, var veiðan 250 skippund eisini eftir tveimum mánaðum, og hetta var roknað fyri at vera hampiligt.

### Verkfalsár

Nú koma vit til 1953. Sigast kann, at 1953 og 1954 gjørdust sonn verkfalsár hjá fiskimonnum. Í 1953 vardi verkfallið í heilar 3 mánaðir, og kravið var at fáa bruttosáttmála, t.v.s. sáttmála við ongum frádráttum. Hetta eydnaðist eisini fyri ein part, men nýggi sáttmálin kom tó at geva minni av sær enn tann gamli.

Hetta førdi til eitt nýtt verkfall í 1954, sum vardi 2 mánaðir. Tað varð kent ólógligt av fasta gerðarrættinum í Danmark, men endaði annars við eini munandi hækking í minstulønini hjá fiskimonnum.

### Lá væl fyri hjá John

Í 1953 gjørdist John Joensen úr Oyndarfirði skipari við Álaker. Tað lá sera væl fyri hjá John við snørinum. Hann dugdi so ógvuliga væl at finna fisk. John hugsaði eisini um fólkið, og hvønn sunnudag fóru vit inn á Patreksfjørðin at hvíla fólkið. Vit høvdu eisini sera gott fólk. Umborð vóru serliga oyndfirðingar, víkarmenn og eiðismenn.

Brøðurnir hjá skiparanum vóru eisini við, og teir vóru av raskastu monnum.

Summir menn eru meira hegnigir enn aðrir. Eg minnast motorpassaran, Jákup Kristoffur, sum eisini var svágur mín. Hann kundi fáa tað heilt ótrúliga burtur úr. Vit høvdu eina gamla trolaratelefon umborð. Onkuntíð gekk hon fyri, og so fór Kristoffur saman við øðrum at taka sundur. Telefonin varð tikin niður av skottinum, og teir at skrúva. Altíð eydnaðist teimum at fáa hana í lagi aftur.

### Fingu fínan túr

Á Suðurlandinum gekk tað hampiligt hjá okkum sum hjá øðrum skipum. Nú fara vit vestur um í Faxa- og Breiðubuktina seinast í apríl ella fyrst í mai. Sunnudag lógu vit við jøklinum. Vit sótu og prátaðu niðri í kahúttini, tað var fínasta veður, og motorurin var sløktur. Kappin niður í kahúttina var afturi á reyv. Nú hoyri eg, hvussu teir fíla á dekkinum við vaðbeinið. So tonkti eg við mær sjálvum, at tað merkir fong. Eg veit ikki, um tað var ein grynna, hann hevði lagt á, men vit komu so í stóran tosk, várfisk, og tað var fínasta veður. Vit høvdu ein kassa eftir av sild til agn, sum vit høvdu við úr Føroyum. Tað var norsk sild, sum var í trækassum. Hon var ísað í eini krubbu, tí tá var hvørki frystikassi ella ískrubba, men sildin var spilt og bleyt.

So fór John at skjóta fugl til agn. Vit royndu alla vikuna í fínasta veðri og fingu 6.000 toskar, sum vóru eini 100 skippund.

Sunnudagin fóru vit inn á Patreksfjørðin, og har løgdu vit okkum millum skipini. "Álaker" sá út sum ein mási á vatninum framman. Skipið hevði verið á beding - sá ikki út til at hava fiskað nakað. Vit høvdu 400 skippund tann vártúrin og fingu ein fínan túr, meðan aðrir fingu minni.

Hetta var ein góð byrjan hjá John. Tá var gott lag á Kjartan Mohr. Eg haldi ikki, at vit fóru aftur til Íslands hetta árið. Tá var tað, at vit fóru í sildina, har tað gekk gott.

### Beinleiðis inn í Vestmannaoyggjarnar

Vit vóru á Suðurlandinum í 1958, og var hetta triðsíðsta árið á saltfiskaveiðu undir Íslandi við snøri og snellu.

Tað var so nógvur avlandsvindur. Tað var so ringt veður, at vit fóru beinleiðis inn í Vestmannaoyggjarnar. Har lógu eisini aðrar sluppir sum "Sigurfarið", "Esther" og "Fimm Systrar". Íslendingar fingu so nógvan garnafisk um hesa tíðina, og teir manglaðu fólk at arbeiða undan.

Har lógu vit eina viku. Orsøkin til at íslendingar kundu fiska, meðan vit lógu inni, var, at í 1958 hevði Ísland flutt fiskimarkið út á 12 fjórðingar, meðan íslendingar sjálvir kundi fiska inn í klettin í lé av landinum. Teir kundu tískil fiska í nógv verri veðri enn vit.

Tá valdu nakrir av teimum ungu umborð, at teir heldur enn bert at dríva hann av, skuldu fara at arbeiða hjá einum reiðara har, so teir kundu vinna nøkur oyru eyka.

Eitt kvøldið koma boð um, at nú er veðrið batnað og vit fara út. Hesir ungu vildu fegnir tryggja sær ágóðan fyri arbeiðið, men hetta lá ikki fyri, tí alt var jú afturlatið. Men teir fáa so ein kekk í part.



*Jóhannes Brúarfoss í stýrihúsinum á "Álaker"*

Tá teir seinni koma inn á Reykjavík, fara teir inni í ein banka at loysa kekkin út, men fáa tey beskeð, at har er eingin dekningur. Hesir ungu í øðini og kenna seg snýttar. Teir vilja hava politi uppí og vilja ikki fara úr bankanum. Tá kemur ein "fínur" maður framvið, og hann spyr, hvat ið er á vási. Tá vísir tað seg, at hetta er stjórin í bankanum. Hann hyggur at kekkinum og sigur so: "Hetta er jú mín góði vinur nn í Oyggjunum. Har er einki problem". Og so fingu teir peningin í stundini.

Íslendska krónan var ikki serliga støðug tá í tíðini, so teir skundaðu sær at keypa sær okkurt meira virðisfast, sum t.d. klæðir, sum teir kundu hava heim við sær.

### Illveðurstekn: Havhestarnir settu seg á flekiborðini

So bleiv ein skái eina ferð, og vit fóru út skírisdag og fingu 350 ella 400 fiskar. Tá vit reinsaðu fiskin, settu havhestarnir seg á flekiborðini millum menninar, og varð hetta roknað sum illveðurstekn. Nú eru vit liðnir at reinsa. John skuldi vera uppi, og tað var framvegis gott veður. Tá hoyra vit eitt sovorðið sjóð, og nú kemur skipið í ein sildastima. Tað kókaði um okkum. So tørnaðu vit inn, og John kom upp. Tá brendi hann á við illveðri, og tað lukkaðist akkurát at koma í Oyggjarnar, og har lógu vit aftur eina viku.

Tá bleiv ein lítil skái, og vit fóru út aftur, men tað var ikki veður at fiska. Vit sigldu vestur á Selvogsbankan, men tað var framvegis ikki fiskandi fyri veður, so vit fóru inn undir Selvogsbjørgini at varpa upp. Har lógu vit uppvarpaðir, til vit mistu varpið. Vit prøvaðu at koyra loddið niður. Tað var ikki so mikið sum ein fiskur. Her fyltu skipini seg annars eftir kríggið. Hetta má hava verið tí, at tað var so nógvur avlandsvindur, so fiskurin er ikki komin inn. So blíðkaði hann einaferð so mikið, at tað var fiskandi, men tað var eingin fiskur har á Selvogsbankanum.



*Teir standa við snøri. Fremst og aftureftir standa: Kristoffur Joensen, Jacob Høgnesen av Hellunum, Oskar Thomsen úr Nólsoy, Arne Andreassen, beiggi Andrias, Jógvan Petersen úr Oyndarfirði og Jákup Martin Joensen úr Oyndarfirði*



*F.v. Jógvan Petersen, Hans Johannes Gaard úr Oyndarfirði, kokkur og Jacob Høgnesen*

Sosialurin